Til allar tingmenn

LØGTINGIÐ

Løgtingsformaðurin

**17. mars 2020**
**j. nr.**
(at tilskila í svari)

Í sambandi við, at Koronafarsóttin hóttir landið, hevur Formansskapurin tikið stig til eina “serskipan” fyri Løgtingið, um neyðugt verður at kalla tingið saman at viðgera ávís skundmál, soleiðis at ikki øll 33 skulu møta á fundi.

Hetta er neyðugt, um vit á bestan hátt skulu verja okkum fyri, at ein tingfundur ikki skal enda við, at alt tingið aftaná kemur í sóttarhald, tí ein okkara seinni verður staðfestur sjúkur við Covid-19 virusi. Um tingið møtir á tingfundi í einari minni útgávu, kunnu aðrir tingmenn verða tøkir seinni, um tørvur er á tí. Á hendan hátt kann sum frægast bindast um heilan fingur, eins og smittuvandin við tingfundi minkar.

Sambært § 18 í Stýrisskipanarlógini, kann Tingið ikki taka avgerð um mál, uttan at meira enn helmingurin av tingmonnum eru á fundi, tvs. minst 17 tingmenn.

Gjørdur er ein leistur, sum byggir á verandi tingmannabýti, har bæði flokkar og samgonga/andstøða eru umboðað lutfalsliga javnt. Grundað á hetta hevur formansskapurin við heimild í § 14 í Tingskipanini tikið avgerð um, at 20 tingmenn skulu luttaka á tingfundi, og at hinir verða verandi heima. Hetta er **lóglig frávera** eftir boðum frá Formansskapinum fyri at verja tingið.

Flokkarnir verða umboðaðir soleiðis:

- Fólkaflokkurin 5
- Sambandsflokkurin 4
- Javnaðarflokkurin 4
- Sjálvstýri 1
- Tjóðveldi 4
- Framsókn 1
- Miðflokkurin 1

**Tingbólkaformenninir velja út, hvørji skulu umboða teirra flokk, og geva hinum boð um at verða verandi heima.**

Gjørt skal gera vart við, at umsitingin í tinginum eisini verður skerd til fundin av somu orsøk, og at eingin matur verður serveraður í matarhøllini (bert kaffi, te og vatn).

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Vinarliga

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

/

Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri